

# Nýrasteins-knúsan

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS

Innihaldið í hesum faldaranum er dagført 12/07/2023

## HVAT ER  EIN NÝRASTEINUR

Nýrasteinar mennast í nýra-kokuni, sum liggur upp at nýrunum. Har samlast nýgjørda landi og verður beint gjøgnum landræsi niður í bløðruna. Um kálk og ótørv fella út sum krystallir, í staðin fyri at verða í uppløysn í landinum, mennast steinarnir.




Flestu nýrasteinarnir eru smáir og fara gjøgnum landræsini við fáum sjúkueyðkennum, men tá nýrasteinarnir gerast uml. 5-6 mm, kunnu teir seta seg fastar í landræsini og elva til trupulleikar og nógva pínu.

Steinarnir kunnu eisini verða verandi í nýrakokuni, har teir bert eru til ampa, um teir forða fyri frárenslinum.

## SJÚKUEYÐKENNI VIÐ NÝRASTEINI

Um tú hevur ein ella fleiri nýra-steinar, ið hava sett seg fastar í landræsunum ella í landræsi-opinum, fært tú pínu, ið byrjar undir síðuni ella í rygginum - beint undir niðasta rivjabeini, og strálar niður ímóti røðrunum. Pínan kann gerast sera sterk og kemur í herðindum. Tú hevur tørv á bráðfeingis linnandi heili-vági.

Nýrasteinar kunnu gera rivur í slímhinnuna, sum kann viðføra blóð í landinum. Tað er tó ofta í so smáum mongdum, at vit gerast bert varug við tað, um landið verður kannað.

Afturvendandi infektión í land-ræsunum kann eisini koma av, at steinar eru í landræsu-num.

Er landræsið tipt, kann trýstið í nýrakokuni veksa og viðføra, at henda víðkast. Er landræsið tipt í longri tíð (tvær til tríggjar vikur), kann økta trýstið viðføra skaða á nýrini.



## KANNING FYRI NÝRASTEIN

Fært tú sjúkueyðkenni, ið benda á nýrastein, verður í fyrsta umfari gjørd ein CT-urografi.

## VIÐGERÐ FYRI NÝRASTEIN

- linnandi heilivágur
- JJ-katetur
- knúsan av nýrasteini.

## VIÐGERÐ VIÐ NÝRASTEINS-KNÚSARA

*Hvussu verður nýrasteinurin knústur?*

Sjúklingar við nýrasteins-trupulleikum hava nú í boðið at fáa viðgerð her á landi, við nýmótans viðgerðartøkni-frøðini URS/RIRS, í samsvar við altjóða rákið innan serøkið.

Viðgerðin fer fram sum dag-kirurgi.

*Hvat geri eg, um eg taki heilivág?*

Heilivágur verður tikin eftir avtalu við narkosulæknan.

*Verið eg doyvd/ur?*

Viðgerðin fer fram í fullari doyving

*Hvussu langa tíð tekur viðgerðin?*

Vanliga tekur ein viðgerð millum 30 og 60 minuttir.

*Nær kann eg fara aftur til arbeiðis?*

Sjúklingar, ið hava knúst nýra-steinar eru vanliga arbeiðsførir dagin eftir viðgerðina

*Hvat kann eg sjálv/ur gera eftir viðgerðina?*

Tað er umráðandi at drekka ríkiligt av vatni dagarnar eftir viðgerðina.

*Nær skal eg til kontrol?*

Tú skalt aftur til CT-urografi kontrol umleið 3 – 4 vikur eftir steinknúsanina.

## EFTIR VIÐGERÐINA

Um trupulleikar við nýra-steinum vísa seg at verða afturvendandi, er kunnleikin um, hvat steinarnir eru gjørdir av, av stórum týdningi, og tí verður heitt á sjúklingar um at senda steinarnar á rann-sóknarstovuna á sjúkrahús-inum til analysu.

**Bestu eydnu við viðgerðini.**

*Eru ivamál, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á tlf. 34 33 00.*

*Vinarliga*

*Suðuroyar Sjúkrahús*

**Um tú ikki kanst møta ásettu tíð, verður tú vinarliga biðin at ringja tlf. 34 33 00 lokal 3227.**